


www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 05 - 2012

# Petoro legði 43 mia. í norska ríkiskassan

Partafelagið Petoro, sum tann norski staturin eigur, og sum umsitur ta almennu luttøkuna í oljuloyvum á norska grunninum, hevði eitt sera gott úrslit fyrsta ársfjórðing í ár. Avlopið var heilar 42,9 milliardir norskar krónur, og tað er besta úrslitið, sum Petoro nakrantíð hevur havt í einum ársfjórðingi. Kjell Pedersen, sum er forstjóri í Petoro, sigur í tíðindaskrivi, at gongdin í virkseminum og lutfalsliga støðugir prísir á marknaðinum gera, at felagið kann lata statinum so nógvar pengar í einum sum ongantíð fyrr. Hann leggur afturat, at avlopið, sum Petoro lat ríkiskassanum fyri fyrsta ársfjórðing í ár, var 25 prosent størri enn fyri sama tíðarskeið í fjør. Partafelagið Petoro varð stovnað í 2001. Tá føroyska oljufelagið Faroe Petroleum fyrr í ár fekk virðisløn fyri at hava gjørt besta handilin av sínum slag í norska oljuumhvørvinum, so var tað nettupp út frá eini avtalu við Petoro. Feløgini gjørdu ein býtishandil, sum hevði við sær, at Faroe Petroleum kundi økja um sína oljuframleiðslu við umleið 9000 tunnum um dagin. Afturfyri fekk norska felagið partin hjá Faroe Petroleum í Maria loyvinum. Hetta var eisini fyrsti býtishandil, sum norska almenna oljufelagið hevur gjørt við eitt privat oljufelag. Um Petoro og Faroe Petroleum eisini í framtíðini fara at samstarva er ilt at meta um. Men norski parturin av Faroe Petroleum hevur eina sera týðandi adressu í Stavanger, nevniliga í tí snotuliga Petorobygninginum.